100 ár við

Sum fjórða fótbóltsfelag í landinum kann MB nú halda 100 ára føðingardag. Fríggjakvøldið varð markerað við føðingardagstiltøkum, og seinni í ár verður so stóra føðingardagsveitslan

100 ÁR
Jákup Mørk

Fríggjadin varð club 100 í føroyskum fótbólti víðkað við enn einum limi. Her hevði TB annars í nøkur ár verið einsamallur limur, men í fjør komuu HB og KÍ afturat, og nú er tað so Miðvágs Bóltfelag, sum fer um tey 100.

Í minningarriti, sum MB lat gera fyri 15 árum síðani stendur soleiðis um stovnanina av felagnum. »Tann 21. januar 1905 komu menn saman í Miðvági við Carl Johansen, presti í Jansagerði, á odda at stovna eitt fótbóltsfelag. Hetta felag fekk navnið Midvaag Fodboldklub, sum seinni varð broytt til Miðvágs Bóltfelag, MB.«

Hesin sami Carl Johansen var eisini formaður í felagnum fyrstu árini. Hann var komin til Føroya í 1893 sum vágaprestur, og hetta tengt saman við áhuganum fyri fótbóltinum førdi við sær, at hann millum manna fekk navnið, fótbóltsprest-urin. Í 1914 gjørdi hann tó av at flyta til Veflinge á Fyn saman við føroysku konu síni, og tá gjørdist so neyðugt við nýggjum formanni fyri felagið.

Fiskimenn sluppu bíligari

Lógir og reglur skulu eisini til, um skil skal vera í einum fótbóltsfelag, og heldur ikki her vóru miðvingar sørir. Felagið hevur framvegis fyrstu lógirnar í varveitslu, og í hesm stendur soleiðis um endamál og virksemi felagsins.

§1: Foreningens formål er ved øvelser i boldspil, særlig fodbold, at fremme udviklingen af legemlig kraft og behændighed hos dens medlemmer.

Víðari framgongur av viðtøkunum, at limagjaldið fyrsta árið var ávíkavist eina og hálvaaðru krónu um árið. Eina krónu rindaðu teir, sum part av árinum fiskaðu undir Íslandi, og tí ikki altíð høvdu møguleika at taka lut í venjingum og dystum. Hartil var eisini gjørligt at tekna seg sum passivan lim í felagnum. Hesi skuldu rinda eitt ársgjald á 50 oyru.

MIÐVÁGS BÓLTFELAG

MB – 1905

Miðvágs Bóltfelag 85 ár

Tann 21. januar 1905 komu menn saman í Miðvági, við Carl Johansen presti í Jansagerði á odda, at stovna eitt fótbóltsfelag. Hetta felag fekk navnið Midvaag Fodboldklub, sum seinni varð broytt til Miðvágs Bóltfelag, M.B. Felagið verður [illegible] 85 ár um ein góðan mánað.

»Fótbóltsprestur«

[illegible]

»Fótbóltsprestur«, sum legði lunnar undir fótbóltinum í Miðvági fyrst í hesi øld

Fyn. Hann doyði 87 ára gamal.

Elstu lógir felagsins

[illegible]

Hetta er elsta mynd, ið er til skjals av einum MB-liði. Myndin er frá 1912 — [illegible]

2. juli 1905: MB – »B71«

[illegible]

[illegible] MB-liði, sum [illegible]

Blaðið, sum MB gav út í samband við 85 ára dag felagsins, er nýtt sum høvuðskelda undir greinini. Á permuni sæst m.a. mynd av »fótbóltsprestinum« Carl Johansen

Móti »B71« í 1905

Fyrstu nøgvu árini var sandurin í Miðvági vøllurin, sum nýttur varð. Mangan var hetta eitt trupult undirlendi. Ikki minst, tá flóð var.

Ein av allar fyrstu dystum felagsins var longu í juli mánaði 1905, tá sandoyingar komu á vitjan. Tann dystin vunnu miðvingar 2-0, men dysturin varð ikki settur ígongd fyrr enn kl. 10 á kvøldi. Tástaðni var fjarað somikið, at spælandi var, og hóast hetta, so var talan framvegis um bleytt undirlendi, har upprikni tarin eisini gjørdi sítt.

Tá í tíðini var ikki talan um nakra skipaða kapping, men nakrir dystir vórðu so kortini leiktir. Eitt nú varð í 1908 skipað fyri tveimum dystum móti HB, sum vórðu umrøddir í Dimmalætting. Ikki minst frásøgnin frá seinna dystinum sýnir, at sosiala aspektið tá í tíðini mundi viga nakað væl meira, enn tað oftani tykist gera í dagsins útgávu av spælinum, har úrslitini í ovurstóran mun eru avgerandi.

»Der blev fra Midvingernes side vist en udpræget gæstfrihed mod Thorshavnerne, der ikke tog afsted før henad ottetiden mandag morgen«.